VALGREINAR

# Lyfti: Fast samband – Úrslit: Scania!

**Eyðgunn Samuelsen**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum í Norðoyggjum*

Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava lovað okkum undirsjóvartunnil til Norðoyggjar. Hetta var so umráðandi fyri teir at staðfesta fyri okkum, at løgmaður sjálvur í síðstu løtu mátti leggja eina lóg fyri tingið, har tingmenn sjálvir kundu seta tað inn í lógina, ið teir høvdu hug til. Hetta hendi undir tí stóra s j á l v t ø k u b o r ð i n u m síðstu dagarnar tingið var savnað.

Hetta lyftið, er sum alt annað, ið lovað er seinastu 4 árini, treytað av fullveldinum. Vit mugu hava fullveldi fyrst siga teir, so verður alt gott !! Tað er nú eineferð so, at tá ið eitt valskeið er runnið er tað úrslitini ið vit skulu meta útfrá, tá ið vit avgera, hvar vit seta krossin næstu ferð. Vit hava fingið lovað fast samband og hvat fáa vit? Scaniu og eina nýggja ferðu ætlan ið millum annað hevur við sær ??

At tey 20-30 fólkini ið hvønn dag ferðast inn á meginøkið til arbeiðis, mugu fara upp kl. 4.00 um morgunin og verða við hús aftur klokkan 20 um kvøldið !!

Vit vóru annars von við at nýta 4 tímar hvønn dag til ferðing, hetta gevur 20 tímar um vikuna og tað svarar til eitt hálvt starv. Nú skal tú avstað 1 tíma fyrr og kemur aftur 1 tíma seinni !!

Tænastan umborð er eisini versnað, tú má vera fremst í bíðirøðini um tú skal vissa teg um at fáa ein kopp av kaffi ella eitt rundstykki. Eg sigi ella, tí tú kann ikki vænta at fáa bæði, í hvussu so er ikki sama túr. Hetta hevur nógv at siga hjá fólkið ið nýtir so stóran part av degnum til ferðing.

Hetta er bara tær umleið 5 vikurnar meðan Scania siglur kannst tú vóna, men gakk !! Tá Dúgvan byrjar aftur at sigla, er ferðaætlanin so snild, at tú kemur at nýta ein tíma meira hvønn dag enn gamla ferðaætlanin hevði við sær, so 20 tímar um vikuna verða til 25 !!

Hevði tað so bert verið óhøgligt fyri tey ið ferðast til og frá arbeiði, men sum tað sær út so má man spyrja, er tað høgligt fyri nakran yvirhøvur ??

Skúlagongdin bæði á Kambsdali og í Klaksvík er kaotisk tí tíðirnar passa ikki. Tað eru um 100 ungfólk í fara inn á Kambsdal hvønn dag og eini 50 ið fara til Klaksvíkar í skúla. Skal tú ørindi í Havn, so má tú fara til Havnar at bíðja í tímavís og eg kundi nevnt fleiri dømir…

Tað skal vera ringt innan tað verður gott verður sagt, men vit hava næstan hug at siga nei til tunnilin um vit kunnu fáa tað betri nú, er tað tað teir ætla ?? Hvussu nógv kunnu vit líta á teirra lystir um tunnil, um vit hava ferðasambandið, ið vit nú hava fingið frá teimum, í huga ??

Lat okkum velja flokkar, ið siga, tað skal ikki vera ringt innan tað verður gott . Og sum ikki siga fullveldi fyrst, men korðini hjá fólkinum og gerandismálini skulu loysast fyrst av øllum !! Lat okkum tí velja Javnaðarflokkin !!

Eydgunn@post.olivant.fo

# Betri kor til fólkið

**Dan R. Petersen**
*løgtingsmaður*

Tað kom dátt við hjá hinum flokkunum, tá Javnaðarflokkurin kom við sínum uppleggið, sum innihelt alt tað, sum henda samgonga hevur forsømt hesi 4 árini. Reaktiónin frá serliga Tjóðveldisfjokkinum var, at okkara stevna kostaði alt, alt ov nógv.

Men sum tann álvarsflokkur Javnaðarflokkurin er, høvdu vit gjørt útrokningar upp á allar okkara ætlanir, og tær koma at halda.

Sjálvandi kostar at føra umstøðurnar hjá teimum gomlu og veiku ajour, sum henda samgongan hjartaleyst hevur forsømt.

Sum tey flestu vita, standa ellis- og røktarheim ovast á skránni, 160 pláss í 4 ár. Tað kostar sjálvandi pengar, men pengarnir eru væl farnir. Javnaðarflokkurin setir nevnliga tey gomlu í Føroyum nógv hægri enn tað vælsignaða flaggið hjá Høgna Hoydal í New York. So er tað sagt!

Næst á skránni eru pensiónirnar.Fólkapensióni n saman við samhaldsfasta skal geva pensionistinum 10.000 kr. um mánaðan og pørum 16.000 kr.

Samgongan reypar av, at teir hava hækkað fólkapensiónina. Men hækkingin varð ikki meira enn 4,30 kr. um dagin. Tað svarar til ein hálvan mjólkarpakka. Her skulu vit hugsa um, at hetta eru størstu gulltíðir, landið nakrantíð hevur upplivað.

Eitt annað hjartamál, sum okkara flokkur setur ovast, er viðgerðin frá tí almenna, sum borgarar fáa, sum av einari ella aðrari orsøk eru komin illa fyri antin av sjúku ella vanlukku. Mannagongdirnar eru nógv ov trekar og seinførar.

Nakað so grundleggjandi sum at fáa ein brúsustól til eitt sjúkt fólk tekur minst 2 mánaðar at fáa, hóast lækni hevur ávíst tørvin, og miðstøðin hevur slíkar á goymslu. Tað eru eisini dømi um fólk í koyristóli, ið búgva 25 m. frá almannaveg. Umsókn um henda lítlað vegastubba frá húsunum til vegin hevur ligið í ár. Hetta tíðir uppá ótrúliga langa saksviðgerð.

Eitt annað ítøkiligt dømi er um ein mann, sum hevur fingið játtan frá Almannastovuni um at fáa breiðka hurðarnar í húsinum og møguleika at sleppa út í tún við egnari hjálp. Í sínari tíð tók tað manninum 3 mánaðar at byggja húsini. 6 mánaðir eru nú gingnir, síðan hann søkti um hesar smábroytingar,og seinast eg visti - og tað er nýliga - var so onki hent.

Hetta eru bara 3 dømir av ótalligum.

Javnaðarflokkurin ætlar at broyta mannagongdirnar og einfaldgera tær, so borgarin fær eina skjóta og góða viðgerð.

Allarhelst er fólkatrot á fleiri stovnum, og óivað er ov nógv byrokrati.

Okkara politikkur skal fyrst og fremst snúgva seg um borgarans kor, og tí seta vit fólkið fyrst.

# Ein veruligur eldrapolitikkur

**Vilhelm Johannesen**
*valevni javnaðarfloksins í Norðoya valdømi*

Um mánaðarskiftið august /september 2001 gjørdi javnaðarflokkurin sína valskrá til løgtingsvalið 30. apríl 2002. Valskráin, ið varð almannakunngjørd á landsfundi floksins, sum varð hildin í Vestmanna í døgunum 14. og 15. september 2001, fevnir um so at siga øll samfelagsviðurskifti.

Undir herrópinum FÓLKIÐ FYRST, leggur javnaðarflokkurin sera stóran dent á eldrapolitikkin og sigur m.a., at eitt politiskt høvuðsmál hjá javnaðarflokkinum er at styrkja fólkapensiónina og at lyfta samhaldsføstu eftirlønarskipanina upp til eina munagóða skipan fyri allan arbeiðsmarknaðin. Vit seta okkum fyri, at útvega í minsta lagi 160 ellis- og røktarheimspláss komandi fýra árini, og at útbyggja heimarøktina við eini døgnrøktarskipan.

Vit siga, at fólkapensiónin skal økjast, bæði við at hækka upphæddirnar og við at prístalsregulera alla pensiónina. Samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønar grunnurin skal styrkjast, bæði við at stovnsfæ grunnsins verður munandi økt, og við at inngjaldið frá arbeiðsgevarum og løntakarum verður økt úr 1/2 upp í 2%. Ein slík øking skal mótvigast við samsvarandi lækking í skattinum. Við fólkapensiónini og samhaldsfasta skulu stakir pensionistar koma upp á 10.000 kr. um mánaðin og hjún, har bæði fáa pensión, skulu koma upp á 16.000 kr. um mánaðin, og hesar upphæddir verða øktar við árligu rentutilskrivingini hjá Samhaldsfasta.

Bráfeingistørvurin á ellis- og røktarheimsplássum er so stórur, at javnaðarflokkurin í valskránni hevur sett sær fyri, at komandi fýra árini verða neyðugar íløgur settar á fíggjarlógina, soleiðis at 160 nýggj ellis- og røktarheimspláss verða tøk. Landskassans partur av íløguni verður umleið 80 mió. kr. í fýra ár. Fleiri og fleiri eldri liggja einsamøll og óhjálpin heima um náttina. Tí vil javnaðarflokkurin beinan vegin útbyggja heimarøktina við einari døgnrøktarskipan við tilkalliskipan. Hetta økir um tryggleikan og møguleikan at vera verandi í egnum heimi. Og nógv eldri fólk vilja sjálvandi verða í egnum heimi so leingi sum møguligt.

Javnaðarflokkurin hevði ábyrgdina av almannamálum tá vit í sjeytiárunum fingu heimarøktarskipanina. Javnaðarflokkurin hevði eisini ábyrgdina av almannamálum tá vit í 1980 fingu nýggja heimasjúkrasystraskipan. Seinni eru hesar báðar skipanina lagdar saman. Javnaðarflokkurin var fyrsti flokkar á tingi sum kom við uppskoti til lóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima. Vit løgdu eisini til brots við lógini um bjálvingarstuðulslán til hús hjá pensionistum. Og javnaðarflokkurin vil aftur nú verða tann slóðbrótandi flokkurin á eldraøkinum. Tí siga vit hægri pensión, fleiri ellis- og røktarheimspláss og eina døgnrøktarskipan.

Sum eg nevndi í fyrstuni, so eru átta mánaðir liðnir, síðani javnaðarflokkurin gjørdi og almannakunngjørdi sína valskrá. Hetta var í eini tíð, tá tey politisku høvdini enn vóru køld, og áðrenn valfepurin gjørdist alt ov ógvusligur. Seinastu vikurnar og dagarnar hava hinir flokkarnir almannakunngjørt sínar valskráir. Í nógvum førum hava hinir flokkarnir eftirgjørt valskránna hjá javnaðarflokkinum og innbygt nakrar yvirbjóðingar. Veljarin eigur ikki at lata seg taka av fótum av hesum. Hesar valskáir eru gjørdar eftir at politisku høvdini ikki longur vóru køld og eftir at valfepurin gjørdist rættuliga ógvusligur.

Teir veljarar, ið vilja hava eina veruligan og góðan, men samstundis realistiskan eldrapolitikk í Føroyum, eiga at fara mannsterkir á val og seta ein sterkan javnaðarflokk inn á Føroya Løgting týsdagin 30. apríl. Valdagin fara kvinna og maður av húsi og seta X við lista C ella eitt av valevnunum á listunum hjá javnaðarflokkinum. Tað verður eitt gott val fyri eldra ættarliðið av føroyingum.

# Einfalt val – vel Føroyar!

**Poul Michelsen**
*Valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy*



Tað eru so nógv onnur mál, sum eg kundi hugsað mær at nomið við til hetta valstríði. Um varsemi í búskapinum, um studningsfría vinnu, um kappingarføri í privatu vinnuni og almennu umsitingini, um heilsu- og almannaverki, um betri skúlaverk við alternativum møguleikum, um bygdamenning og høvuðstaðar røkt, um fleirlanda útbúgvingarval hjá ungum, um betri og virðiligari loysnir til gomul fólk v.m., men valstríðið hjá afturhaldsflokkunum gongur uppá, at her verður kaos, hungur og hall, um føroyingar taka ábyrgd av sær sjálvum. Tí vil eg bert royna at lýsa, hvat fullveldistilgongdin gongur út uppá.

Fullveldisgongdin er ein 12 – 15 ára long tillagingartíð til ein sjálvberandi føroyskan búskap. Ein tíð, har vit skulu tillaga almennu umsitingina at taka sær av teimum yvirtøkum sum gjørdar verða og loyva effektivar og nýhugsaðar umsitingarligar loysnir. Ein tíð, har vit skulu geva heilsurøktini alheimsstøði, og eina eldrarøkt, sum í nógv størri mun byggir á heimlig virðir. Ein tíð har heimligi skúlaskapurin í størri mun søkir fleirleikan í samfelagnum, og geva ungum møguleika at fáa útbúgvingina, har tey halda vera best og at gera hetta fíggjarliga møguligt. Ein tíð, har visjónir, gransking og list fáa viðurkenning og høga raðfesting. Ein tíð har Føroyar skulu søkja inn í alheimsfelagsskapir, tað veri seg vinnuligar, mentanarligar, ítróttarligar, politiskar v.m. og at brúka tann ótrúliga møguleikan, vit tá í alheimshøpi hava sum sjálvstøðugt land.

Tá fullveldistillagingartíðin endar, fara føroyingar, sum búskaparligt frælst fólk, á eini fólkatkvøðu at avgera um Føroyar tá skal vera ein verdugur limur í ríkisfelagsskapi við Danmark ella velja annan felagsskapshátt at samstarva við onnur uppá.

Men alt hetta treytar tó, at fullveldistilgongdin heldur fram. Fólkaflokkurin er besta trygdin fyri hesum, og at trygdin fyri at gongdin verður fult forsvarlig. Fólkaflokkurin eigur samstundis besta boðið uppá politisku leiðsluna til hesa uppgávu.

Veljið Føroyar og føroyingar at tryggja framtíð okkara – ongin annar kann gera tað.

# Samstarv við danir sum javnbjóðis partnarar gevur førleikamenning

**Annita á Fríðriksmørk**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy*

Men hvussu er við krígspensjónini, við eftirlønum úr donskum pensjónskassum, við føroyafrádráttinum í Danmark, við DIS-skipanini, og hvussu við føroyskum sjúklingum á ríkissjúkrahúsinum. Hetta eru vanligir spurningar fólk seta tjóðveldisfólkum, tá ið hesi tosa um fullveldi. Og tað er eisini fint við spurningum og tey krevja øll eitt svar!

Krígspensjónin er skylda, sum danski staturin hevur mótvegis einstaklingum í Føroyum, og hon ávirkast ikki av ríkisrættarligu støðuni.

Eftirlønir úr donskum pensjónskassum ávirkast heldur ikki, tí her er talan um avtalu millum einstaklingar ella bólkar í Føroyum og danskar eftirlønargrunnar.

Føroyafrádrátturin í Danmark er ein skattaavtala millum Føroyar og Danmark, og ávirkast ikki, tá Føroyar gerast sjálvstøðugar.

DIS-skipanin: Ríkisborgaraskapur ávirkar heldur ikki støðuna hjá føroyingum undir DIS.

Føroyskir sjúklingar á ríkissjúkrahúsinum: Hetta er ein postur sum føroyingar longu hava goldið fyri í fleiri ár. Á føroysku fíggjarlógini verða settar av árliga einar 60 milliónir krónur til endamálið. Útreiðslan fer til at fíggja sjúkrarøkt á ríkissjúkrahúsinum, ferð aftur og fram fyri sjúkling og møguliga fylgjara, og fyri uppihald á Hotel Tórshavn somuleiðis fyri sjúkling og møguliga fylgjara.

**Tað sum broytist, tá vit gerast sjálvstøðug, er** lestrarstuðul til lesandi í Danmark, sum vit skulu til at gjalda sjálvi. Hann er ein útreiðsla fyri SU uppá 43 milliónir krónur árliga. Boð Tjóðveldisfloksins er, at vit yvirtaka hendan post og seta 60 milliónir av til endamálið!

Tá talan er um føroyskar skiparar í danska handilsflotanum, so sigur lógin, at skiparar á brúnni skulu verða danskir ríkisborgarar. Men danska stjórnin hevur sagt heilt greitt, at um Føroyar skipar seg sum land við fullveldi, fer stjórnin at gera undantøk fyri føroyingar, tí danski handilsflotin er sera glaður fyri føroyingarnar umborð og fer at gera alt fyri, at hesir skiparar og komandi kunnu verða verandi umborð.

Við øðrum orðum fara einar sjálvstøðugar Føroyar at geva okkum eitt nógv betri samband við Danir, har vit í framtíðini kunnu samstarva sum tveir javnbjóðis partnarar.

Við vón um eitt gott val, har sjálvbjargnisneistin vinnur landinum framá.

# Tann ovurhonds dýra rentan

**Kaj Leo Johannesen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreym*

Fyri umleið tveimum mánaðum síðan segði landsstýrismaður við fíggjarmálum frá tingsins røðarapalli, at kreppan fyrst í 90'unum hevði kostað okkum nógvan pening í ovurdýrum rentum av milliardalánunum, sum ríkiskassin veitti landskassanum fyri at bjarga okkum úr svarari neyð, sum hótti allari mannsømiligari tilveru í tjóð okkara. Hyggja vit eitt sindur í landskassans roknskap ár 2000, so síggja vit, at rentuútreiðslurnar vóru 213 milliónir ella 5% av landskassans skuld l. januar 2000.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum átti nú upp undir løgtingsvalið at greitt Føroya fólki frá, hvussu nógv eyka prosent ríkiskassin hevur tjent við øllum milliardalánunum sprændar í føroyska samfelagið. Tað hevur sum kunnugt stóran almennan áhuga.

Um, landsstýrismaðurin í fullveldismálum veruliga er av teirri áskoðan, sum kom til sjóndar eitt nú í Sosialinum nr. 29, at vit heldur áttu at lánt allar milliardirnar úr t.d. Týsklandi, ella onkrum øðrum fremmandum landi við ríkiskassa veðhaldi , so loyvi eg mær at spyrja, hvat Landsstýrismaðurin meinar við orðið "olmussa", sum hann fleiri ferðir hevur krøgt upp á okkum føroyingar?

Nei, tað er valla nakar føroyingur, sum brýggjar seg um at verða kallaður olmussudýr !

VELJIÐ SAMBANDSFLOKKIN SETIÐ X Á LISTA B.

# Tann skapandi listin

**Jógvan Arge**
*valevni Tjóðveldisfloksins*

Tað sær ikki mætari út enn, at tey føroysku listarfólkini dag og dagliga gera seg fortjent til, at landsins mentanarpolitikkur veitir tí skapandi listini góðar umstøður

Rithøvunurin Jóannes Nielsen fekk sítt millumtjóða gjøgnumbrot hendan dagin, tá kunngjørt varð, at hann fær norðurlendska heiðursløn fyri sjónleikin "Eitur nakað land weekend?".

Føroyskir listarmálarar ferðast eins vandir millum galleríini í útlondum, sum millum framsýningarhølini í Føroyum, og selja út ferð eftir ferð.

Tónasmiðir og tónleikarar smæðast ikki burtur. Sunnleif Rasmussen er viðurkendur víða hvar. Aldubáran leikar á altjóða pallinum. Clickhaze tekur keylur. Pætur við Keldu ger hol í sjógvin. Brandur Enni stendur á flogsteini, og Týr tekur skyldmenninar í Íslandi við stormi.

Tað hevur stóran týdning at geva skapandi listini góðar umstøður. Umráðandi er eisini at ásanna, at ein so lítil tjóð, sum tann føroyska, eigur at brúka lutfalsliga fleiri pengar til mentanarlig endamál enn stórar tjóðir til tess at verja okkara eyðkenni.

L a n d s s t ý r i s m a ð u r tjóðveldisfloksins hevur lagt fram á ting álit um at menna ta skapandi listina. Ein boðskapur er, at størri játtan má til, skal listin fáa nóg góðar umstøður. Mælt verður samstundis til nýggjan umsitingarligan bygnað við umskipaðum mentanargrunni og serstøkum ráðum fyri hvørja listagrein sær.

Tjóðveldisflokkurin stendur fyri einum framsóknum mentanarpolitikki. Vit hava ikki ráð til at vera smálig, og fyri okkum er tað avgerandi, at skipanin, sum verður vald, er dynamisk og hevur so breiða umboðan, at stígur ikki kemur í listarligu menningina.

Vit hava eitt nú sett okkum fyri at stovna ein lista- og tónleikaskúla og at fara undir at byggja og skipa Tjóðleikpall Føroya, sum skal verða karmur um bæði leiklist og tónleik á professionellum stigi og samstundis stuðla áhugaleiki.

Vit virka fyri, at umstøðurnar hjá bókaútgávu, mentanarstovnum og listafólkum sum heild verða betri og at stuðlað verður upp undir átøk, sum skapa føroyskari yrkislist møguleikar heima og úti.

Frambrotið hjá Týr í Íslandi nú um dagarnar er kanska ein ábending um, at føroyskur tónleikur við støði í okkara mentanararvi, tí føroyska dansinum og kvæðastevinum, kann gerast ein eksportvøra, ið nemur hjartarøturnar í øllum Europa.

Dansurin og kvæðini vóru einaferð hjartasláttur í europeiskari mentan. Tað kunna tey kanska gerast aftur í nýggjum hami. Tað fer onki av okkara dansimentan, um vit royna hendan møguleikan og geva listarfólkunum umstøður at dubba seg til dystin.

www.jogvanarge.com